Fiskavirking 11 milliónir í undirskoti eftir hálvum ári

– Stóri trupulleikin er, at á teimum sjey virkjunum hjá okkum verður minni enn ein triðingur av kapasitetinum brúktur, sigur Bjarti Mohr, stjóri á Fiskavirking í sambandi við, at hálvársroknskapurin vísir 11 mió. krónur í undirskoti.

NICLAS JOHANNESEN

Hálvársroknskapurin fyri 1996 hjá Føroya Fiskavirking sær ikki tespiligur út.

Fyritøkan hevur 6 mió. kr. í undirskoti áðrenn avskrivingar og 11 mió. kr. í undirskoti eftir avskrivingarnar.

Hóast eitt skiftisavlop upp á 21,7 mió krónur, so vísir úrslitið áðrenn rentur kortini eitt undirskot upp á 832.000 krónur.

Alt í alt hevur Fiskavirking selt fyri 225 mió. kr. og keypt rávøru fyri 145 mió. kr. Hetta gevur eina virðisøking upp á 80 mió. kr. Men tá lønir (40 mió. kr.), tilfar(11 mió. kr.), ravmagn (4 mió. kr.), reklamatiónir (1,3 mió. kr.) og ymiskt annað er goldið, eru tær 80 mió. krónurnar tødnaðar niður áðurnevnda skiftisavlop, sum er 21,7 mió. kr. Beinleiðis útreiðslur til tey fastløntu á teimum sjey virkjunum og fyrisitingina Yviri við Strond í Havn hevur seinasta hálva árið kostað 16,6 mió. kr.

Úrslitið fyri tann partin av Føroya Fiskavirking, sum er í gongd, vísir sostatt, at slakar 5 mió. krónur eru í yvirskoti.

Men við útreiðslum til stongdu virkini, rentum til prioritetsskuld, avskrivingum og øðrum, vísir roknskapurin tó eitt samlað tap upp á 11 mió. krónur fyri fyrra hálvárið 1996.

Yvirkapasitetur

Stjórin á Føroya Fiskavirking Bjarti Mohr vil ikki gera viðmerkingar til sjálvan hálvársroknskapin hjá gjaldsteðgsraktu fyritøkuni.

Men hann hevur onki ímóti at vísa á, at hjá Fiskavirking er størsti trupulleikin manglandi rávøra.

– Tey sjey virkini, sum eru ígongd, verða brúkt minni enn ein triðing av tíðini. Tað vil siga, at tann rávørunøgdin, vit hava fingið, klárar slettis ikki at forrenta stóra framleiðslutólið, sigur Bjarti Mohr.

Stjórin á Føroya Fiskavirking, sum í summar segði upp og sostatt fer úr starvi 1. januar komandi ár, leggur dent á, at tað eru ikki virkisleiðararnir og starvsfólkið annars, ið er ódugnaligt, men stóri yvirkapasiteturin. Ella fyri at venda tí á høvdið: Manglandi rávøran.

– Støðan er sera vánalig. Eg rokni við, at meira enn helvtin av fiskinum, sum verður fiskaður undir Føroyum, fer av landinum. Og tá er so lítið at gera, sigur Bjarti Mohr.

Bjarti Mohr, stjóri á Føroya Fiskavirking, sigur at størsti trupulleikin hjá Fiskavirking er, at tey sjey virkini verða brúkt minni enn ein triðing av tíðini. Fyrra hálvár í ár hevði Føroya Fiskavirking eitt undirskot upp á 11 milliónir krónur

Amerada Hess í kappingini við aðrar á føroyskum øki

Kanningarleiðarin hjá Amerada Hess, Richard Hardmann, er ein maður við stórari virðing millum manna. Samstarv hansara við forstjóran Sam Laidlaw verður tilskrivað ein stóran part av framgongdini og góða úrslitinum hjá felagnum á bretskum øki. Nú hava teir báðir so vent eyguni móti føroyskum øki.

DIA MIDJORD

At seinasti veturin var kaldur í flestu londunum, hevur óivað gjørt sítt til, at oljuprísurin í dag er rættiliga høgur. Eitt sokallað »Boom« er í løtuni innan oljuvinnuna og hetta førir við sær, at aktiviteturin er nógvur innan oljuvinnuna. Meðalprísurin á eini oljutunnu hevur leingi ligið um 16 dollarar, men er í løtuni uppi á 23 dollarum.

Richard Hardman er kanningarleiðari hjá Amerada Hess. Hann ber orð fyri at vera ein sera góður handilsmaður, ið hevur stóra viðurkenning millum fólk og feløg innan oljuvinnuna

Uppsvingið innan oljuvinnuna hevur gjørt sítt til, at oljufeløgini hava víst føroyskum umráði eitt sindur meira áhuga enn vanligt. Og eitt av oljufeløgunum, ið hevur lagt kortini á borðið og ætlar sær við í kappingina við aðrar, er Amerada Hess Ltd - ein familjufyritøka við síni serligu søgu.

Á føroyskum øki hevur Amerada Hess gjørt samstarvsavtalu við Lasmo, Norsk Hydro og Dong. »Amerada Hess bólkurin« er eitt nú við í boringini í Lopra.

Stovnað 1919

Tað letur seg gera hjá eini familjufyritøku at fáa altjóða viðurkenning. Í hvussu er kann oljufelagið Amerada Hess tilskrivast hesa æru.

Amerada Petroleum varð stovnað í 1919 í USA. Endamálið var at leita eftir og framleiða olju í USA og Kanada.

Tað var bretska familjan Pearson, ið grundlegði fyritøkuna. Og Pearson-familjan er ikki hvør sum helst. Hon stendur eisini aftan fyri búskaparblaðið »Financial Times«.

Í 1933 stovnsetti amerikumaðurin Leon Hess oljufelagið Hess Corporation. Øll tríatiárini kláraði Hess skerini við at selja petroleum á gøtuni.

Pengar til krút

Undir øðrum heimsbardaga bleiv Amerada Petroleum nationaliserað av bretsku stjórnini, ið skuldi brúka pengar at rinda fyri løður, ið amerikumenn lotu. Bretska stjórnin seldi seinni 90 prosent av sínum partabrøvum.

Aftan á seinna heimsbardaga fór Amerada í samstarv við tvey onnur felag - Conoco og Marathon - um oljuframleiðslu í Libya. Hetta eydnaðist sera væl og bleiv ein rættilig succes. 420.000 tunnur vórðu framleiddar um dagin.

Amerikanska uttanríkisráðið tvingaði seinni Amerada úr hesum samstarvi. Orsøkin var politiska kreppan millum USA og Libya.

Leon Hess keypti

Í 1969 seldi bretska stjórnin síni 10 seinastu prosent í felagnum Amerada. Seks ár undan søluni varð Amerada biðið um at vera við í einum samstarvi, ið skuldi gera kanningar í bretska partinum av Norðsjónum.

Tá bretska stjórnin seldi sín part í Amerada, keypti Leon Hess henda partin, og tá bleiv Amerada Hess Corporation veruleiki.

Í mai mánaði 1995 fór Leon Hess frá sum oddamaður fyri oljufelagið, og sonurin John Hess tók við leiðsluni sum nevndarformaður. Øll hesi árini Leon hevði staðið við róðrið varð stýrt við harðari hond.

Í 1983 setti Leon Hess tann bert 28 ára gamla Sam Laidlaw sum stjóra fyri øllum virksemi í Bretlandi. Um sama mundi bleiv Richard Hardman settur kanningarstjóri í felagnum.

Samstarvið millum teir báðar hevur hepnast stak væl og verður tilskrivað ein stóran part av framgongdini og æruni hjá felagnum í bretskum øki. Tíggju tey fyrstu árini trífaldaðist felagið í Bretlandi.



Framkomni oljupallurin hjá Amerada Hess á Scott-feltinum, ið framleiðir 200.000 tunnur um samdøgrið

FARVE